# Oyl-landsliðið úttikið

SVIMJING
*tíðindaskriv*

Oyggjaleikalandsliðið møtist í Havn til venjing komandi vikuskiftið

Nú fer at nærkast at Oyggjaleikirnir verða, so síðstu fyrireikingarnar eru farnar ígongd.

Svimjararnir møtast fríggjakvøldið 24juni kl 20, og verða tríggjar venjingar.

Svimjararnir ið skullu við til Hetland eru :

Shaila millum Garðarnar, Jutta Thomsen, Sára Ejdesgaard allar úr TS, Lisbeth L.Joensen og Andrass Thomsen úr HS, Beinir Danielsen úr Flot, Jákup Øssursson, Karina Petersen, Elspa Mørkøre, Kári Jóanesarson á Høvdanum øll úr FS, Kristian Olsen , Natalia Reinhardt úr Ægir.

Venjarar eru Petur Heðin á Fløtti og Søren Olsen.

# Aðrir dagar

Einki er at siga til, um veteranurin hjá VB, Bjarni Johansen, var fegin, nú tað eydnaðist VB at fáa fulla úrtøku.

- Hetta eru aðrir dagar. Vit skoraðu enntá trý mál, og tað er í øllum førum meira, enn vit hava gjørt í nøkrum dysti í ár, helt hann.

- Eg haldi eisini, at vit vóru øðiliga tendraðir. Vit vildu vísa, at hesa ferð skuldu vit hava øll stigini, og sum heilt gekst tað eisini heilt væl. Vit komu eisini fram til onkrar møguleikar, men fyri steðgin tóktist tað kortini vera sama søgan um, at vit ikki skora.

Og tit misnýttu eisini brotsspark, sum Dan Djurhuus brendi. Fóru nakrir tankar ikki ígongd hjá tykkum tá?

- Jú. Tað gjørdu tað. Men tíbetur megnaðu vit allir - og ikki minst Dan - at koma væl aftur í dystin, helt Bjarni.

- Móti endanum sovna vit kanska nakað, men tíbetur eydnaðist at halda tørn, soleiðis at stigini vórðu fingin til høldar.

-jm

# Seinasta útkall

Magni á Lakjuni hjá ÍF helt eftir dystin sunnudagin, at tað nú álvara er farið at sansa at hjá teimum. Og hann ásannaði eisini, at avrikið sunnudagin ikki var nóg gott.

- Eg haldi, at vit vóru uppsettir, men tað rakti ikki ordiliga á rætta lagið. Og hinvegin var hetta klárt tað besta, sum VB hevur spælt móti okkum. Sjálvandi hava vit nakrar møguleikar móti endanum, men samanlagt var sigurin hjá teimum í lagi, helt Magni á Lakjuni eftir dystin

Og eftir frálíku byrjanina er tað nú av ávara um at gerast kritiskt hjá tykkum á stigatalvuni?

- Ja, tað er um at verða seinasta útkall, um vit skulu upp úr botninum. Og so kann tað gera tað sama, um tað er B36 ella onkur annar, sum kemur á vitjan komandi vikuskiftið. Tað skulu aðrir bollar á suppuna, og fyrst og fremst, so mugu vit koma fram til fleiri møguleikar. Stóri trupulleikin er, at vit skapa ov lítið, og tað má og skal betrast, helt Magni á Lakjuni.

-jm

VB-ÍF 3-2 (0-0):

# Bjargingarlína til VB




*Loksins eydnaðist vágbingum at fáa trý stig til høldar. Og nú eru tvey stig upp til næstu liðini*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

**Við sigrinum á ÍF hevur VB nærum fingið samband upp um strikuna aftur. Men seinasta løtan gjørdist nakað nógv meira spennandi, enn vágbingar brýggjaðu seg um**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Í 12 teimum fyrstu landskappingardystunum høvdu vágbingar bara skotið seks mál. Tað var kanska mest sjónligi trupulleikin hjá liðnum, sum nú á stóra føðingardagsárinum hevur havt tað óvanliga trupult í bestu deildini.

Til tíðir hevur spælið verið hampuliga gott, men fátæka málskjótingin hevur sjálvandi gjørt tað trupult at vinna dystir. Og so hevur tað verið tann so vælkendi luturin á einum botnliði, tá persónlig mistøk ferð eftir ferð hava kostað mál í hinum endanum.

Tí hevði VB knvín á barkanum undan uppgerðini móti ÍF. Ein uppgerð, sum skuldi vinnast fyri ein og hvønn prís, um hugsingur skuldi vera um at ota seg upp móti kritisku strikuni. Og samstundis kendu vágbingar tað helst so, at teir høvdu nakað at hevna, eftir at ÍF tvær ferðir í ár var farið úr Vági við teprum 1-0 sigri í viðføринum.

## Mest sum málveitsla

Ofta verður tikið til, at eitt venjaraskifti kann geva spælarunum neyðugu luftina, sum skal til fyri at venda truplum støðum. Og í øllum førum tóktist Dragan Kovacevic púrasta sannførdur um sálarliga týdningin, sum broytingar kundu hava við sær. Við einum nakað umskipaðum liði sendi hann sínar spælarar á vøllin. Mortan úr Hørg var fluttur av bakkinum inn í miðverjuna. Dan Djurhuus varð tikin aftur á miðvøllin, og á einsamalla álopssessinum varð Nenad Zivanovic settur, eftir at hann fyri tað mesta hevur stríðst á miðvøllinum.

Og í øllum førum tóktist spælararnir eisini uppsettir. Teir vunnu flestu nærdystirnar, og fyri tað nógva varð eisini spælt beinleiðis, soleiðis at veruligir møguleikar spurdust burturúr.

Men kortini mundu heimaáskøðararnir kenna seg ikki heilt álvuligar við støðuna. Mál komu framvegis ikki, og tá Dan Djurhuus so eisini misnýtti brotsspark, kundu suffini nærum hoyrast um alla bygdina.

Men spælararnir mistu ikki mótið. Teir hildu á við at trýsta, og tá VB so loksins kom ígongd, var tað ikki við mýkindum. Í 13. dystinum skoraðu vágbingarnir trý mál, eftir at fyrstu 12 dystirnir bara góvu seks mál, so einki er at siga til, um lagið í skiftirúminum var batnað nakað eftir dystin.

Og í øllum trimum førum var tað í vinstru, at uppspælið gekk fyri seg. Símun Samuelsen átti fyrsta málið, tá hann breyt ígjøgnum, áðrenn hann legði út frá til Milan Kuljic, sum langaði bóltin í kassan. Løtu seinni var tað Dan, sum var arkitekturin, tá hann nýtti somu uppskrift at spæla Milan leysan, og at enda vóru tað so Símun og Dan, sum tóku sær av uppleggi og málskjóting.

## Mundu mist alt

Við 3-0 á talvuni og bara góðum korteri eftir at spæla, mundi eingin ivast í, at hart tiltrongdi sigurin nú var heima. Og ivaleyst hildu spælararnir hjá VB eisini sjálvir, at so var. Teir høvdu bara gloymt, at ÍF ikki hevði givið skarvin yvir, og tí gjørdist seianasta løtan nakað nógv meira spent, enn vágbingarnir høvdu ætlað.

Teir minkaðu um munin, tá VB-verjan snorksvav, soleiðis at Sylla brádliga gjørdist púra leysur, og so satsaðu fuglfirðingar alt. Teir minkaðu niður í 2-3, tá Bartal stútaði frísparksinnlegg, sum í fyrstu atløgu varð bjargað, men har Hanus Eliasen í eftirfylgjandi trunkaspælinum fekk sent í kassan.

Fleiri mál komu ikki, men tað var ikki tí, at eingir møguleikar vóru. ÍF trýsti av øllum alvi, og fleiri ferðir dansaði bólturin í VB-brotsteiginum. Ikki minst tóktist tað merkja VB, tá Milan Kulic varð rikin av vølli fyri nýtslu av álboganum í loftdyst. Og í øllum førum vóru vágbingarnir ikki nøgdir um tíðina, sum dómarin legði afturat eftir hetta.

Hinvegin gav satsingin hjá ÍF eisini møguleikar til VB, men hóast teir fleiri ferðir vóru mest sum blankir ígjøgnum, so fingu teir ikki lukkað dystin.

Men tá alt kom til alt, so mundu vágbingarnir ikki leggja stórt í hetta. Teir fingu tey trý stigini, ið undan dystinum vórðu mett.

## FAKTA UM DYSTIN

**VB-ÍF 3-2 (0-0)**
1-0: Milan Kuljic, 49.
2-0: Milan Kuljic, 74.
3-0: Dan Djurhuus, 77.
3-1: Sylla D. Amed, 80
3-2: Poul Ennigarð, 83.
**Dómari:** Lassin Isaksen
**VB:** Bjarni Johansen - Súni úr Hørg, Mortan úr Hørg, Anders Sørensen, Jákup Olsen - Dan Djurhuus, Pól N. Poulsen (Jón K. Poulsen, 77.), Milan Kulic, Edvard Ble, Símun Samuelsen- Nenad Zivanovic
**GK:** Nenad Zivanovic, Poul N. Poulsen, Milan Kuljic
**RK:** Milan Kuljic
**ÍF:** Allan Joensen - Áki L. Petersen (Atli Petersen, 73.), Pól Ennigarð, Bartal Eliasen, Rúni Elttør - Hanus Eliasen, Eyðolvur Petersen, Símun Eliasen, Høgni Madsen- Sylla D. Amed, Magni á Lakjuni
**GK:** Rúni Elttør, Eyðolvur Petersen